# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Crosskapping við Oyggjarvegin









**Leygardagin 24. mai var annað umfar í Cross-kappingini sum áhugafelagið Føroya MC í Havn skipaði fyri við Oyggjarvegin**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*Maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Ólavur Frederiksen*

Áhugafelagið Føroya MC skipaði seinasta leygardag fyri Cross-kapping við Oyggjarvegin oman fyri Havnina. Í hesum sambandi tók myndamaðurin Ólavur Frederiksen hesar myndirnar.

Kappingin var fyri bæði Motocross og ATV (all-terrain vehicle) (við 4-hjólum), sum eru tvær sjálvstøðugar kappingar. ATV kappingina vann Sofus Jacobsen og MotoCross kappingina vann Sigmund Olsson.

Kappingin er skipað í fýra umførum. Fyrra umfar var leygardagin 26. apríl og tvey tey síðstu umførini vera leygardagin 2. august og leygardagin 27. september 2008.

Tann sum hevur flest stig tilsamans í hvørjari kapping, hevur so vunnið ta kappingina.

Ein kapping er eisini fyri juniorar (undir 14 ár).

Føroya MC er eitt motorsúkklufelag, sum varð stovnað í 2000 við tí endamáli at savna motorsúkkluáhugaði í eitt felag fyri at røkja felags áhugamál. Felagið skipar fyri nógvum ymiskum tiltøkum sum t. d. felagstúrum og ymsikum kappkoyringum.

Road Racing og MotoCross kappingar vera hildnar undur væl skipaðum viðurskiftum og fylgja altjóða reglum og kunngerðum, sum eru tillagaðar umstøðurnar í Føroyum.